ítróttur

Nr. 142 • hósdagur • 28. juli 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# Tað kókar kring Varmakelduna

**Grannaborgarstjórarnir í Fuglafirði og Gøtu siga ólavsøkufinaluna hava stóran týdning fyri teirra kommunur, og feløgini hava leigað HB og B36 húsini at hita upp í**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Jóannes Hansen*

Tað prutlar orduliga kring Varmakeldueiðið. Fótbóltsfeløgini í kommununum, sum liggja báðu megin eiðið, hava strítt seg í steypafinaluna, og seinnapartin í morgin verður tað gjørt av, um tað skal verða GÍ, sum enn eina ferð skal vinna sær atgongumerkir at luttaka í altjóða kappingum næsta ár, ella um tað skal verða ÍF, sum fyri fyrstu ferð nakrantíð skal fáa sítt navn ritað í Løgmanssteypið og harvið fyri fyrstu ferð vinna altjóða atgongumerkir.

- G! festivalurin fór við nógvari tíð og orku. Síðani hevur steypafinalan sett dagsskránna her hjá okkum. Fótbólturin fyllir nógv í Gøtu, og tað hevur alstóran týdning, at tað hevur gingið so væl í steypakappingini. Altjóða luttakan ger tað áhugavert hjá spælarum at umboða GÍ. Tí hevur tað týdning at vinna finaluna. GÍ hevur ofta verið í altjóða kappingum, og eg vænti og vóni, at teir fara at vinna í morgin, sigur Páll Isholm, borgarstjóri.

Hann hevur í fýra ár búð í Gøtu, og hann hevur verið borgarstjóri síðani á nýggjárinum. Hann er føddur og uppvaksin í Havnini og í HB.

- Tað er eingin trupulleiki. HB hevur vunnið nógv og steypakappingina ógvuliga ofta. Nú er tað GÍ, sum tað snýr seg um. Teir hava verið í trimum finalum á Tórsvølli. Tað eru fleiri enn nakar annar. Tað er flott, og eg fari suður at taka á við teimum í morgin, sigur borgarstjórin í Gøtu.

GÍ hevur leigað HB húsið. Har fara viðhaldsfólkini at halda til undan dystinum, og har verður skipað fyri øllum tí, sum tað nú á døgum verður syrgt fyri, soleiðis

Spenningurin er ikki minni norðanfyri Varmakeldueið. Fuglfirðingar eru fyri fyrstu ferð nakrantíð komnir í finaluna um Løgmanssteypið, og teir gera nógv burturúr. B36 húsið er leigað, og har verður uppskriftin umleið tann sama, sum hon verður norðanfyri hjá grannunum fyri sunnan!

- Hetta er positivt, og tað hevur sett rættuligan dám á her í Fuglafirði. ÍF hevur verið á tindinum og niðri í dalinum í ár. At vit eru komnir í steypafinaluna hevur bjargað kappingarárinum. Eg rokni við, at liðið fer at gera alt, sum tað ber til, fyri at vinna ólavsøkudag. Men stóra vónbrotið hevði havt verið, um teir – eftir at hava vunnið á HB í fjórðingsfinaluni – ikki høvdu megnað at koppa B68, sum í ár spælir í 2. deild. Annars haldi eg, at tað sigur nógv um Eysturoynna, at trý av fýra liðum í finaluni vóru higani úr oynni, og at finalan er ímillum tvey feløg úr Eysturroy.

Tað sigur Sigurð S. Simonsen, borgarstjóri í Fuglafirði. Hann er føddur og uppvaksin í Fuglafirði um fuglfirðingur um ein háls. Hann fylgir við ÍF, men hann sigur seg vera so spentan, at hann næstan ikki orkar at hyggja.

- Nú er tað serliga spennandi, tá ið vit skulu spæla á Ólavsøku ímóti GÍ. Men hetta kennist ikki sum kríggj, har tað ræður um at knúlva gøtumenn. Heldur er talan um sunna kapping. Tað verður skemtað og prikað, men tónin er góður. Teir hava havt fleiri spælarar úr Fuglafirði, og nú hava vit havt onkrar frá teimum.

Sigurð heldur tað vera spell, at tveir av lyklaspælarunum hjá teimum fara at sita uttanfyri:

- Reglurnar áttu at havt verið broyttar soleiðis, at gulu kortini duttu burtur undan finaluni, heldur hann.

Borgarstjórarnir hava heilsast á Varmakeldueiði. Í morgin fara teir at heilsast í Gundadali. Annar fer at fara ovurfegin til hús, og hin verður vónbrotin. Hvussu kommunan skal feira sigurin leggja .teir ikki í at siga nakað um. Hugflogið man fara at vísa seg, tá ið steypasingurin verður veruleiki. Í morgin verður svarið funnið, um tað verður Gøtu kommuna ella Fuglafjarðar kommuna, sum skal feira steypasigurin. Tað verður í hvussu so er annað av feløgunum kring Varmakelduna, sum fer at vinna.



*Borgarstjórarnir í Fuglafirði og Gøtu, ávikavist Sigurð S. Simonsen og Páll Isholm, fara báðir til steypafinaluna á ólavsøku, og spenningurin er í hæddini*

# Magni gevst í morgin

**Í Gøtu er manningarstøðan góð, og í Fuglafirði rokna teir við, at tað fer at bera til at vinna, hóast tveir av lyklaspælarunum mugu sita uttanfyri**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Jóannes Hansen*

Magni á Lakjuni verður í ÍF álopinum í morgin. Longu undan finaluni er tað greitt, at hetta verður síðsti dysturin hjá honum á hægsta støði. Tað er av heilsuávum, at hann gevst.

- Læknarnir hava rátt mær frá at spæla. Eg havi tað gott og kann liva eitt lív sum øll onnur. Men onnur mjødnin er so mikið slitin, at tað ikki ber til at venja og spæla fótbólt fleiri ferðir um vikuna. Tað er støðan, og eg havi gjørt av at taka tær avleiðingarnar, sum serkunnleikin hevur rátt til, staðfestir Magni á Lakjuni.

Hann spældi fyrstu ferð á besta ÍF liðnum í 1990. Síðani hevur hann verið nógv í bestu deildini. Hann hevur spælt í HB, har hann var við til at vinna FM í 1998, og hann var við til at vinna steypakappingina við B36 í 2001. Eisini var hann eitt skifti í Vejle Boldklub. Nú hann sigur farvæl, vónar hann, at tað skal bera til at vinna steypakappingina við barndómsfelagnum:

- Eg haldi, at vit eru væl fyri. Hýrurin er góður, og undir venjingini á Svangaskarði týskvøldið kendist tað sum um, at spælararnir trúgva upp á tað. Talan er um finalu, og so nógv kann henda.Tað hava vit sæð í finalunum seinnu árini, tá ið eitt nú brotsspørk og útvísingar hava havt avgerandi ávirkan.

Hjá ÍF eru Bartal Eliasen og Poul Ennigarð leikbannaðir. Fritleif í Lambanum kemur heim úr Danmark at hjálpa til. Símun Eliasen verður í miðverjuni. Saman við honum verður ivaleyst annaðhvørt Rúni Elttør ella Áki Petersen. Jonn Thomsen vandi fyri fyrstu ferð eftir drúgva skaðan, tá ið ÍF týskvøldið var á Svangaskarði, men hann er ikki í nóg góðari venjing at spæla. Gunnar Nielsen vandi eisini týskvøldið. Hann hevur leingi verið burturfrá orsaka av skaða, men hann verður í ÍF hópinum í morgin.

Umframt Magna á Lakjuni hava Rúni Elttør og Símun Eliasen vunnið steypafinalur. Rúni við B36 í 2003, og Símun við HB í fjør. Venjarin, Petur Simonsen, var venjari, tá ið B36 í 1991 vann finaluna 1-0 á HB.

Í Gøtu er manningarstøðan heilt hampulig. Símun Louis Jacobsen verður ikki við, tí hann hevur brotið armin. Burtursæð frá pólverska málverjanum, Marcid Dawid, eru allir hinir tøkir. Eisini Magni Jarnskor, sum leingi hevur verið plágaður av skaða í lærinum. Tríggir stríðast um málverjuplássið, og Kaj Ennigarð vísti sunnudagin, at hann er væl skikkaður til pláss í miðverjuni. Undir venjingum á Svangaskarði í kvøld skal venjarin gera av, hvørjir teir fyrstu ellivu skulu vera.

- Vit taptu 4-3 í Fuglafirði í fyrra landskappingardystinum. Síðani vunnu vit 3-0 á heimavølli á teimum. Eg haldi, at vit eru væl fyri, og vit fara sjálvandi til Havnar fyri at vinna, sigur GÍ liðformaðurin Sámal Joensen. Fyrr í ár var hann buturfrá í seks vikur orsaka av skaða. Nú er hann væl fyri.

Sámal var við, tá ið GÍ vann steypakappingina í 1996 og í 1997. Hann var í Íslandi, tá ið GÍ í 2000 vann á HB, og í 2003, tá ið GÍ tapti ímóti B36, spældi hann ikki fótbólt.

Umframt Sámal hava nógvir á GÍ liðnum verið við í finalum. Eisini yngru menninir, sum í 2003 eftir umdyst vóru við til at tapa 3-1 ímóti B36. Krzystof Popczynski spældi við í 2003. Í morgin hevur hann møguleikan at vinna Løgmanssteypið fyri fyrstu ferð.

## Løgmanssteypið 1989-2004

1989: HB
1990: KÍ
1991: B36
1992: HB
1993: B71
1994: KÍ
1995: HB
1996: GÍ
1997: GÍ
1998: HB
1999: KÍ
2000: GÍ
2001: B36
2002: NSÍ
2003: B36
2004: HB